# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Móttøka

### 25 ára starvsdagur



Fríggjadagin 7. januar kl. 14.00–17.00 verður almenn móttøka á SEV í Tórshavn í sambandi við, at Klæmint Weihe, stjóri, hevur starvast í 25 ár hjá elfelagnum SEV.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Elfelagið SEV**

## Dagurin

**5. januar. Símeon.** Halgimenni úr Kilikiu í Lítluasia, sum doyði í árinum 459. Fekk navnið Stylites, tá ið hann í 422 fekk sær tilhald á einari 6 alin høgari súlu. Súla eitur stylos á grikskum. Hebráiska navnið Shimon er av somu rót sum navnið Sámuel og merkir lítli Sámal

# Elmar Poulsen 60 ár



**Hósdagin 6. januar 2005 fyllir Elmar Poulsen í Klaksvík 60 ár. Í hesum sambandi verður móttøka í Norðoya Sparikassa millum kl. 16-18. Elmar hevur arbeitt á stovninum síðan 1974**

MÓTTØKA

Elmar Poulsen er sonur Marthu og Jóhannes Poulsen. Eftir loknan fólkaskúla byrjaði hann sum býdrongur hjá J. F. Kjølbro í 1962.

Í 1971 varð hann headhuntaður til Stella Shipping Commercial Ltd., har hann starvast til 1972, tá hann fer í starv sum skrivstovumaður á Kósavirkinum.

1. oktober 1974 tekur Elmar við starvi í Norðoya Sparikassa. Í sparikassanum hevur hann starvast innan fleiri starvsøki, eitt nú sum kassameistari, hóast tey flestu í dag kanska kenna hann best frá privatkundadeildini, har hann m.a. fæst við útlánsvirksemi. Elmar hevur eisini verið álitismaður, trygdarumboð og í 2000 varð hann valdur í nevnd sparikassans sum starvsfólkaumboð.

1. oktober 2004 hevði Elmar 30 ára starvsdag í Norðoya Sparikassa, og nú hann rundar tey 60 verður móttøka hósdagin 6. januar millum kl. 16.00 og 18.00 á høvuðsskrivstovu sparikassans, har familja, vinir og viðskiftafólk eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið.

# 35 ár síðan ítróttarfelagið B71 varð stovnað

**Nýggjársdag 1. januar vóru liðin 35 ár síðan ítróttarfelagið á Sandoynni B71 varð stovnað. Umleið 30 fólk møttu á fyrsta fundinum nýggjársdag 1970, har samtykt varð at stovna felagið. Felagið luttók fyrstu ferð í kappingum hjá ÍSF í 1971**



*Formaðurin í B71, Eli Hentze, handaði gávur til tríggjar av stovnarunum: Ragnar Fossdalsá, Jóan Petur Hentze og Klæmint Nicodemussen*

Teir sum stovnaðu felagið vóru: Jógvan Nicodemussen, Niels J. Petersen (á Reynatúgvu), Jóan Petur Hentze (undir Skarði), Ragnar Fossdalsá og Klæmint Nicodemussen.

Felagið gjørdist limur í ÍSF beinanvegin og spældu teir undir navninum Sand. Men av tí at leikararnir komu aðrastaðni frá enn heiman av Sandi, varð avgjørt at skifta navn til B71. So kundu øll kenna seg eins væl heima í felagnum.

Fyrsti sigurin hjá B71 varð vunnin í steypakappingini í Vági móti VB í 1971.

Nevndarlimir í B71 í dag eru: Ragnar Fossdalsá, Jonhard Johannesen, Brandur Sandoy, Hans Falkvard Hansen og Eli Hentze, sum er formaður í felagnum.

Nýggjársdag nýtti felagið høvið at takka stovnarum felagsins við eini lítlari gávu.

Av teimum fimm stovnarunum vóru tríggir møttir: Jóan Petur Hentze, Ragnar Fossdalsá og Klæmint Nicodemussen. Jógvan Nicodemussen hevði forfall, og Niels Jacob Petersen andaðist í 1983, bert 31 ára gamal.

Formaður felagsins, Eli Hentze, handaði gávurnar og segði nøkur orð. Hann segði m.a. "vit eiga at takka stovnarunum fyri, at teir løgdu lunnar undir B71 og hava givið øllum áhugaðum møguleika at luttaka í heimsins besta spæli – fótbóltsspælinum".

Karl Vidtfeldt, ein av hollastu stuðlum felagsins á so nógvum økjum, hevði eisini orðið. Hann hugleiddi um hesi 35 árini, ið hann sjálvur hevði verið aktivur partur av. Hann var eisini á stovningarfundinum í 1970. Karl hevur í drúgva tíð verið leikari, nevndarlimur, formaður, venjari, dómari, leiðari o.a. í B71. Hann varð fyrstu ferð valdur í nevndina í 1974 og gjørdist formaður, bert 15 ára gamal. Hann var formaður til 1996. Síðan 1994 hevur hann verið nevndarlimur í FSF.



*Ein av hollastu stuðlum felagsins og formaður í mong ár, Karl Vidtfeldt*